# Útbúgving á Náttúruvísindadeildini

Útbúgvingarnar á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum eru skipaðar í tveimum: fyrst ein 2 ára náttúruvísindalig støðisútbúgving, og oman á hana framhaldslestur til BS-útbúgving.

**Støðisútbúgvingin**
Í summar verður tikið upp til 2 ára stødd-/alisfrøðiligu støðisútbúgvingina, har undirvíst verður í evnum innan stødd-, alis-, teldu- og tøknifrøði. Fakliga støðið í støðisútbúgvingini er sum fyri 2 ára byrjanarlestur á útlendskum universitetum.

Upptøkutreyt er støddfrøðiligt studentsprógv við støddfrøði á A-stigi, alisfrøði á B-stigi og evnafrøði á C-stigi. Fólk við øðrum fortreytum við tilsvarandi kunnleikastigi í nevndu lærugreinum kunnu verða tikin upp eftir nærri meting.

**BS-útbúgvingar**
1–1½ ára BS-útbúgvingar eru skipaðar oman á stødd-/alisfrøðiligu støðisútbúgvingina: í ravmagnsverkfrøði (1½ ár), kolvetnisverkfrøði (1½ ár), jarðalisfrøði (1 ár) og teldufrøði (1 ár). Seinnu árini hava bert útbúgvingarnar til ravmagns- og kolvetnisverkfrøðing verið bjóðaðar. Treyt fyri upptøku er lokin stødd-/alisfrøðilig støðisútbúgving ella onnur samsvarandi útbúgving.

**Aðrir møguleikar**
Bæði aftan á støðisútbúgving og aftan á BS-útbúgving ber til at fara uttanlands at útbúgva seg til hægri førleikastig, eitt nú til sivilverkfrøðing, cand.scient. ella MSc.

**Stakgreinalestur**
Allar útbúgvingarnar eru skipaðar í modulum. Tí ber til at melda seg til og taka prógv í einstøkum fakum á útbúgvingum, ið eru í gongd. Talan er um fak innan stødd-, alis-, teldu-, tøkni-, lív- og evnafrøði. Áhugað kunnu venda sær til Náttúruvísindadeildina og fáa meir at vit um hendan møguleikan.

**Meir at vita**
Meir fæst at vita um útbúgvingarnar við at venda sær til Náttúruvísindadeildina ella við at kaga í vevstaðið http://www.sleipnir.fo/setur/nvd/

**Umsóknarbløð og -freist**
Umsóknarbløð fáast við at fara undir »Umsóknarblað« á vevstaðnum http://www.sleipnir.fo/setur/nvd/ ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina á tel. 352550 ella við t-posti til nvd@setur.fo.

Umsóknarfreistin er 1. juli 2002.

**Náttúruvísindadeildin**
Nóatún 3, Tórshavn
Postsmoga 2109, FO-165 Argir

# Størv leys at søkja

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskatta-lógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan er á Smyrilsvegi, Posttolldeildin, har viðkomandi koma at starvast, heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru tvey størv leys at søkja til setan á **Posttolldeildini** so skjótt til ber.

Talan er um føst størv fulla tíð, tó kann annað møguliga vera niðursett tíð.

Í báðum førum umfatar starvið kannan og edv-viðgerð av tollingaráheitanum og annað arbeiði í sambandi við tollavgreiðslu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við skrivstovuútbúgving og/ella royndum innan tollarbeiði hava fyrimun.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. tvey sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskifti, sum er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Herman í Stórustovu á tlf. 31 02 60, lok. 156.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**27. juni 2002**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Corolla 1.3
**Árg.:** 1999
**Km:** 40.000

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Att.: Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 34 57 29
fax nr. 34 56 07
e-mail: hw@trygging.fo

At hitta mánadag-hósdag millum kl. 08.30-10.00 og fríggjadag millum kl. 08.30-16.00.

# Avloysarastarv

Á Dómaraskrivstovuni verður søkt eftir fólki við hollari skrivstovuútbúgving, 28 tímar um vikuna, frá 1. juli 2002 til 10. januar 2003.

Viðkomandi verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 31 10 03.

Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 17. juni 2002.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
tann 10. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

# Frá Vágs skúla

**Lærarastarv:**
Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir lærara 27 tímar um vikuna.

Starvið er tíðaravmarkað frá 19/8-02 og so leingi barnsburðarfarloyvi varar.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til skúlastjóran tlf. 373192.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Vágs skúla**
v/ Agnes Tausen
900 Vágur



# Serviceteknikari

Starvið sum serviceteknikari í Útvarpi Føroya er leyst at søkja.

**Starvið:**
Tann, ið verður settur, skal m.a. taka sær av:
- Umvæling og viðlíkahaldi av tekniskari útgerð
- Journalisering av umvælingum
- Nýgerð og tillaging av verandi tøkni
- Uppgávum í sambandi við menning av nýggjari framleiðsluskipan
- Umsiting og viðlíkahaldi av skrásetingarskipan
- Møguligum øðrum uppgávum

**Umsøkjarin skal:**
- Vera útbúgvin radio- ella elektronikkmekanikari
- Hava innlit í ljóðteknikki. Praktiskar royndir á økinum eru ein fyrimunur
- Hava kunnleika til talgilda tøkni (digitalteknik)
- Kunnleiki til EDV-útgerð er ein fyrimunur
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Kunna arbeiða í skiftandi vaktum
- Vera røkin, fryntligur og hava góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt spennandi arbeiði við skiftandi uppgávum í einum góðum umhvørvi
- Eitt starv við møguleika fyri støðugari menning
- Skeið uttanlands, har tú lærir um nýggjastu útvarpstøknina

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.
Umsóknir til starvið skulu vera Útvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi hósdagin 27. juni.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hans Andor Johannesen á telefon 316566.

ÚF **Útvarp Føroya**
Postboks 328, 110 Tórshavn, tlf. 316566

# Hægri lestur á Føroyamálsdeildini 2002–2004

Í september byrjar exam.art.– og cand.phil.–lestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

**Exam.art. í norðurlendskum,**
***serliga føroyskum máli og bókmentum***
Lesturin tekur tvey ár og er skipaður helvt um helvt í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til føroyskt mál og bókmentir í eldri og nýggjari tíð. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreytir eru students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

**Cand.phil. í norðurlendskum,**
***serliga føroyskum máli og bókmentum***
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið frammanundan hava lokið exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í útvaldum málsligum og bókmentaligum evnum.
Deildin arbeiðir við ætlanum um BA-útbúgving sum ávegis prógv til cand.phil.

Upptøkutreyt er exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 1. juli 2002.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

**Føroyamálsdeildin**
**Fróðskaparsetur Føroya**
V. U. Hammershaimbs gøtu 16
Postrúm 272
FO-110 Tórshavn.
Tlf. 352520
Fax. 352521

og á www.setur.fo



# Farmadeildin søkir SØLUFÓLK

Søkt verður eftir sølufólki til farmadeild okkara.

***Arbeiðsuppgávur:***
Uppsøkjandi søluarbeiði, herundir søla av tænastum innan farma-flutning og kundarøkt.

***Førleiki:***
Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevni og helst hava royndir í søluarbeiði.
EDV-kunnleiki á brúkarastøði er ein treyt.

***Løn:***
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja tel. 345962/ 63 og spyrja eftir Jónfinni ella Heðini.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. juni 2002.

team85

**SMYRIL LINE CARGO**
**Postsmoga 370 • 110 Tórshavn**

# Lærarastarv

Sandoyar Meginskúli søkir við hesum eftir einum lærara til tíðaravmarkað starv at lesa fult tímatal í skúlaárinum 2002/2003.

Møguligar umsóknir skulu verða Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 21. juni.

**Skúlastýrið fyri Sandoyar Meginskúla**
v/ Ingibjørn Eldevig
210 Sandur

# Útróðrarbátur til sølu

Sómi útróðrarbátur við allari útgerð til sølu.

**Tlf. 421171 ella 265763**

# Fólk søkist

Søkt verður eftir røskum og kvikum fólki – við koyrikorti – til klárgering av bilum, at byrja beinanvegin.

***AVIS*** *Bilútleiðing*
Staravegur 1-3 100 Tórshavn
Tlf. 313 535

# Servitrisur og barrvørðar

Søkt verður eftir servitrisum og barrvørðum í summar.

MARCO POLO

**Tlf. 313430 / 213430**

# Klinikkassistentur

Vegna farloyvi verður søkt eftir klinikkassistenti fyribils í fulla tíð tíðarskeiðið 12. aug. 2002 til 31. okt. 2002.

Møguliga verður tíðarskeiðið longt.

Løn- og setanarviðurskiftir sambært S & K.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juni.

**Terje Davidsen, tannlækni**
Traðavegur 1 · 410 Kollafjørður
Tlf. 421510 · Fax 421406

Sosialurin
www.sosialurin.fo